# Miðvikan

Framhald frá síðu 33

til frystihúsið. Prísurin var bestur fyrstu árini, tá fingu við 25 oyru stykkið. Í tredivunum vóru ringar pengatíðir. Tá var ringur prísur fyri allan fisk.

Úrtøkan var ymisk hesi árini. Tað mesta vit fingu í part var 1.500 kr. og tað minsta var 700 kr. Vit kundu ikki láta illa at, tí úrtøkan hjá okkum var ofta hægri hjá okkum enn við sluppunum.

Onkur ár tarnaði óveður útróðrinum. Plássið var kyrruvant, og lendingin var ring. Tað var tungt at bera fiskin niðan á bakkan. Tí bygdu vit okkum skúr so niðarlaga, sum til bar, fyri at tað kundi vera høgligari at fáa fiskin til høldar. Vit gjørdu okkum eisini drátt, so at tað var lagaligari at draga bátin. Vit gjørdu dráttin soleiðis, at tað bar til at draga bátin við talju. Hetta lætti nógv um. Fyri at sleppa at gera hetta niðri í fjøruni rindaðu vit 20 kr árliga til Aldufelagið, sum átti ræðið á fjøruni á Skálum.

## Einfaldur proviantur

Provianturin hjá okkum var keks, margarin og sukur. Hetta høvdu vit havt við okkum úr Føroyum. So var tað sjálvsagt fiskur og livur. Ofta høvdu vit steikta ella kókaða sild til døgurða. Í krambúðini hjá Stefani Jónssoni var vøra at fáa, men vit royndu at keypa sum minst. Aldufelagið hevði motorbát siglandi við vøru til handilin. Men tað var ikki so sjáldan, at tað var longri millum ferðirnar hjá motorbátinum enn ætlað. Tá var handilin ofta í uppsetur við vøru. Tá kom tað væl við, at vit sjálvir høvdu nakað at taka til. Eitt sindur av skerpikjøti høvdu vit eisini havt við okkum. Men tað var ikki hvønndagskostur sum vituligt er.

Vit nýttu altíð primus at matgera við. Grýtur, ketlar, kannur og allar skaffigreiðir áttu vit sjálvir.

Íslendingar, sum róðu út hjá Aldufelagnum, høvdu konufólk at halda hús hjá sær. Hetta vóru ógvuliga fitt fólk, og tað var ikki sjáldan, tær gjørdu okkum ein beina. Til dømis var tað ofta leygardagar, at tær bakaðu okkum ein køkubita til at hava sunnudagin. Hetta var forkunnugt at fáa. Vit lótu tær fáa kalvasprek afturfyri.

Mær dámdi íslendingar væl. Tað var sjálvandi ójavnt fólk har sum aðra staðni. Tey flestu vóru óføra dámlig.



*Hans Marius Hansen er grivin í kirkjugarðinum á Skálum*



*Sonur Kristionnu, Sigurd, bakkaði ikki fyri bondskari yvirvøld*

## Sungu sum veiðan hevði verið

Uppiløgudagar varð lítið gjørt. Vit vældu okkum sjálvsagt um reiðskapin. Annars hvíldu vit okkum, tí tað var strævið lív at rógva út í Íslandi. Vit vitjaðu fólk. Har vóru eisini nógvir føroyingar, so mangt var at tosa um. Íslendingar vóru blíðir og sera tíðindafróðir.

Heiligdagarnir vórðu altíð hildnir. Tá lósu vit lestur og sungu eisini. Í okkara felag vóru eingir framúrskarandi sangarar, men vit royndu eftir førimuni.

Undir liðini á okkum búði eitt bátafelag, har tað vóru menn sum dugdu at syngja. Men væl hoyrdist á sanginum, um vikan hevði verið ein veiðuvika. Hevði hon verið góð, var sálmasangurin harður og dunandi. Var hon vánalig, var ikki meira enn tað grælaði úr teimum.

Tá ið tað leið móti heimfaringartíð, hentaðu vit ber, soleiðis sum allir íslandsmenn plagdu at gera. Men ójøvn vóru árini eisini her. Best vóru berini, um kavin lá leingi út á várið og summarið.

Tað var ikki minni strævið at rógva út í Íslandi enn at vera til skips. Men tað var meira friður. Náttin var friðarligari, og vóru ikki útróðrarlíkindi, so vóru vit á landi. Umborð á skipi var eingin friður uttan bakkdagar, og tá var ofta eisini ótýdligt.

## Føroyingar á Norðfjørðinum

Ì seinasta parti fregnaðust við eftir føroyingum sum í gomlum døgum búðu á Norðfjørðinum. Vit hava nú fingið meira at vita um teir.



*Bygdin Skálar um 1940*

Christianna Cathrina Jacobsen, ættað úr Mortanstovu í Havn, var fødd 11. september 1860. Hon verður tann 27. august 1883 heima við hús gift við Johan Hendrik Poulsen f. 19. apríl 1862, úr Skopun. Tá hava tey longu fingið sonin Sigurd Marius Poulsen (1882-1977). Tey fingu afturat Henriettu Katrinu. Johan Hendrik doyr longu 18. juli 1884. Tey náddu ikki at vera gift í eitt ár.

Katrina giftist aftur 18. juli 1884 við Sigmund Lucassen f. 1867. Tá áttu tey sonin Hans Johan Hendrik f. 21. mars 1887. Umframt hann fingu tey í 1889 dótrina Sigrid Christina Johanna Jensina. Hon doyði longu í 1891. Sigmund gongur burtur 21. januar 1889, so Kristianna var bert 29 ára gomul, táið hon er einkja aðru ferð.

Tá var hon so illa fyri, at hon visti sær ikki onnur ráð enn at lata børnini upp í hendurnar á skyldfólki og fara til Íslands at arbeiða. Hon giftist við íslendingi á Norðfjørðinum og eigur hóp av eftirkomarum. Samstundis kom hon í søguna sum elsta fólk í síni tíð.

Ættin hjá henni í Føroyum er millum annað tey sum eita Stórá.

Tað er ein áhugaverd frásøgn hjá Jens Marius Hentze í Kvørnini nr. 5 um son hennara Sigurð, sum fekk stóra bót fyri at hava verið »nasvísur« við sýslumannin Johan Hendirk Schrøter.

Torkil Fredrik Joensen, Keli færeyingur, sum eisini var umrøddur í seinasta parti, var ættaður úr Havn. Foreldrini hjá honum vóru Jørgina Christiane Lindenskov (1807-1854) og Johan Fredrik Michael Joensen (1820-1865). Sjálvur var hann føddur 7. januar 1848. Hann hevur verið heilt ungur, tá ið hann misti foreldrini, og í 1870 er hann at finna á Tvøroyri. Hann sigst at vera komin haðani til Íslands í 1875. Her er hann í fólkateljing sagdur at vera »bátasmiður og bátaútvegsbóndi.« Hetta seinna man standa fyri hansara útleiging av skúrum til føroyingar. Torkil doyr 26. juli 1921, 73 ára gamal.

Brita Black er abbadóttir Jákup Biskupstøð f. 1867, sum var nógv ár í Íslandi, eisini á Norðfjørðinum, har hann bygdi eitt stórt tal av bátum. Henni er fortalt, at eina ferð um aldarskiftið kemur Torkil við eini slupp úr Íslandi á Klaksvík. Hann hevði ein smádrong við sær. Kennskapur var, so teir gistu hjá Jákupi, til teir hildu fram til Havnar. Drongurin var vist Jóin Vilhelmsen, sum til á ellisárum var kendur sum gøtusópari í Havn.



*Ein kend havnarmynd. Jóin kom heim til Føroya av Norðfjørðinum við Torkil Joensen*

Tað var ikki ókent, at føroyingar høvdu børn úr Íslandi við sær til Føroya at vera. Umstøðurnar í Íslandi vóru so vánaligar, at hildið var, at hetta var tað besta fyri børnini.

Brita sigur eisini, at Torkil var ein kendur lásasmiður, sum kundi opna peningaskáp, sum aðrir høvdu givið upp.

Myndin av bátasmiðjum í seinasta parti var av Eiði. Teir vóru Johannes og pápabeiggi hansara Hans Martin í Miklagarði. Johannes var á Norðfjørðinum sum bátasmiður. Tí man myndin vera komin yvir hagar.

Vit hava frá Torbjørn Joensen í Kollafirði fingið at vita, at myndin niðast á 4. síðu í seinastu Miðviku er tikin umborð á Gerpir í 1957. Standandi f.v. eru: ókendur, Kjartan Højgaard, Rituvík, Torbjørn sjálvur, Per Gullstein, Rituvík, Niclas Joensen, Kollafjørð. Fremstur er Johannes Petersen, Rituvík

**Komandi partur**
verður byrjað ein røð um Stóru Dímun. Vit hava hitt Janus í Dímun, sum hevur búð í Dímun í nærum 80 ár